# Stjørnan lýsti




*Tveir Harrans tænarar í Heilaga landinum – vinstrumegin Jógvan Fríðriksson biskupur og bygdarmaður hansara, Niels Jacob Nielsen trúboðari*

**Saman við 40 føroyingum var Jógvan Fríðriksson, biskupur á vitjan í Ísrael í heyst. Hetta var ein áhugaverd vitjan og sum gav hon nógv at hugsa um. - Eg var alla tíðina greiður yvir, at Ísrael í dag ikki svaraði til barnadreymar mínar. Hetta hevði eg gjørt mær klárt frammanundan, og tí gjørdist ferðin í roynd og veru ein sera rík uppliving, sigur hann. Serliga minnisverd var vitjanin í føðibýi Jesusar, Betlehem.**

VITJAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Ísrael:** - Tá vit hanga stjørnur á eitt jólatræ ella hyggja eftir stjørnunum á himmalhálvinum, so hyggja vit altíð upp í loft. Men tá vit komu til sonevndu Føðikirkjuna í Betlehem at leita eftir teirri serstøku stjørnuni, ja,

> *Her stóðu jødar sum framvegis bíða eftir Messiasi. Her stóðu fólk úr fremmandum londum og við aðrari trúgv enn okkara. Og her stóðu samstundis 40 føroyingar sum fagnaðu hesum sama Messiasi.*

so máttu vit hyggja niðureftir!, greiðir Jógvan frá.

Føroyska ferðalagið kom inn í hesa kirkjuna, sum trongdi harðliga til eina kerliga hond. Umsíðir skuldu tey síggja ta vøkru stjørnuna undir hválvinum.

Men soleiðis varð ikki, tí har uppi var eingin Jesusstjørna at síggja. Hon var hinvegin fest í ein klett í gólvinum.

- Sært tú. Stjørnan lýsti frá jørðini og uppeftir, og ikki úr himlinum til jarðar. At eg sjálvur ikki væntaði tað øðrvísi, kann helst ikki beskrivast øðrvísi enn ein arbeiðsskaði!, sigur biskupur við brosi á kinn.

Sosialurin hevur hitt Jógvan Fríðriksson til eitt jólaprát um ferðina sum Ísraelsmissiónin skipaði fyri til Heilaga Landið í oktober mánaði í ár.

## Dreymur ella veruleiki

Líka síðani Jógvan var smádrongur hevur hann havt eitt ynski og ein dreym um at vitja í heilaga landinum.

- Tann bíbilski heimurin hevur altíð sagt mær nógv. Eg kennist við landið, býirnar og søguna heilt frá tí eg var smádrongur. Men ikki fyrrenn nú bar hetta til, greiðir hann frá.

At fara til Ísraels ber Jógvan saman við myndina í heimbygd hansara, Strendur: Nógv er broytt í bygdini, síðani hann traðkaði barnaskógvar sína her – fjøran er ikki hin sama, bygdin er vaksin nógv og umstøðurnar broyttar á mangar mátar.

Hetta var sama kenslan sum hann hevði, tá hann á fyrsta sinni setti fótin á ísraelska jørð:

- Eg var alla tíðina greiður yvir, at Ísrael í dag ikki svaraði til barnadreymar mínar. Hetta hevði eg gjørt mær klárt frammanundan, og tí gjørdist ferðin í roynd og veru ein sera rík upplliving, slær hann fast.

Jógvan leggur kortini dent á, at Genesaret-vatnið framvegis er Genesaretvatnið og at Kedronar løkur framvegis er Kedronar løkur. Hinvegin eru menn ikki heilt samdir um, hvar Golgata er.

- Júst hetta hevur kortini ikki tann stóra týdningin fyri meg. Tað týdningarmesta fyri meg er, at eg gekk á teimum støðunum har Frelsarin hevði gingið.

- Hetta var ein sera sterk og ótrúlig upplliving, sigur biskupur.

## Niðurslitið tá – og nú

Eitt var at vitja á støðunum, ið Jógvan kendi úr Bíbliuni. Eitt heilt annað var at hitta fólkið á staðnum, - at standa andlit til andlit bæði við jødar og arábar.

Tey flestu kristnu hava helst sera positiva uppfatan av Ísrael, men kanska ikki eins positiva uppfatan, ella hava kanska beinleiðis fordómar, móti palestinum og arábum. Hesar ymisku metingarnar fekk føroyska ferðalagið ein gyltan møguleika at fáa størri kunnleika um, ein dagin tey vitjaðu í Betlehem.

> *Eg biði bara um, at mín kristna trúgv ongatíð verður innkapslað í ein ævintýrheim ella í eina romansu, men altíð má vera ítøkilig og hava jørðforbindilsi*

Betlehem er í dag als ikki at meta sum nøkur glæstriborg, men er hinvegin niðurslitin. Tað er greitt, at her er stórur tørvur á eini dagføring og upprudding. Tey vitjandi hava jú goldið fyri at koma higar at síggja føðibýin og kanska fleiri teirra hava eina hugmynd av, at býurin er tann sami í dag sum hann var, tá Jesus traðkaði sínar barnaskógvar her.

- Satt at siga gjørdist eg als ikki vónsvikin av at síggja býin soleiðis. Hetta vísti mær bara enn einaferð – og 2000 ár seinni – at Jesus ikki er ein persónur úr einum ævintýrheimi. Heldur hinvegin.

- Hetta gjørdist ein sonn prædika fyri meg, at Gud gjørdist menniskja og gav son sín bókstavliga, at liva undir fólksins korum so sum tey vóru tá í tíðini, og